umhvørvisstovan

HOVS KOMMUNA

960 HOV
FØROYAR

Argir hin 11. mars 2011
Málsnr.: 10/00671-7
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Viðvíkjandi: spillivatnsætlanin hjá Hovs kommunu er góoðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 11.03.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29 oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Hovs kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

Umhvørvisstovan fekk hin 09.11.2010 spillivatnsætlanina til góðkenningar (mál nr. 10/00671-1). Ætlanin er gjørd av HMP Consult, ráðgevandi verkfrøðingum. Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við HMP Consult, og 04.01.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 10/00671-4).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í spillivatnsætlanini, ið varð send 04.01.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Hovs kommuna søkti tó um undantak til at útrenningin frá Brúarvegi, sum í ætlanini verður nevnd útleiðing nr. 1, skal liggja í minsta lagi 1 metur undir størstu fjøru. Grundgevingin fyri hesum er:

1. Tá útleiðing nr. 1 varð gjørd, var tað sera trupult at fáa nøktandi festing í botnin út fyri útleiðingina.
2. Útleiðingin varð gjørd í 2003 og sæst einki til nakað spillivatn ella uppsavnan frá útleiðingini.
3. Spillivatnsnøgdin er lítil, umleið 10 PE
4. Vatnútskiftið á fjørðuni er gott.

Út frá omanfyri nevndu grundgevingum og við heimild í grein 11 stk. 2 í spillivatns-kunngerðini, kann Umhvørvisstovan góðtaka nevnda undantak .

Hin 10.03.2011 sendi Hovs kommuna Umhvørvisstovuni teldupost (mál nr. 10/00671-8), har tað framgongur at Hovs kommuna á fundi 01.03.2011 hevur samtykt spillivatnsætlanina, ið HMP Consult hevur gjørt.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, tvs. tann umhvørvisliga partin av spillivatnsætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensioneringin o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10 stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

Vinaliga

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit**: sp/f HMP Consult, Óluvugøta 12, 100 Tórshavn